# Jack the Ripper túrur

Áhugin fyri illa gitna drápsmanninum, Jack the Ripper, er alsamt vaksandi, og í dag bjóða fleiri fyritøkur seg fram við Jack the Ripper-túrum runt í Whitechapel-økinum, har Jack the Ripper drap fimm skøkjur í 1888. Túrarnir ganga gjøgnum alt økið og vitjað verður á teimum fimm støðunum, har Jack the Ripper framdi drápini. Tað er ongantíð eydnast løgregluni at finna fram til, hvør Jack the Ripper var, men fleiri teoriir eru settar fram, og greitt verður frá um hesar á túrinum. Eisini verða myndir vístar sum sýna, hvussu gøtur og bygningar sóu út tá Jack the Ripper gjørdi um seg. Flestu av drápsplássunum eru ikki til í dag í tí líki tey vóru í 1888, men myndir hjálpa til at stimbra hugflogið í so máta. Onkur av hesum fyritøkum leggur enntá leiðina framvið løgreglustøðini, har detektivarnir arbeiddu, ið royndu at loysa gátuna um Jack the Ripper. So hava loyndarmál og morðgátur tín áhuga, er ein Jack the Ripper-túrur avgjørt eitt upplivilsi vert.





















